Heilsuhjálparafelag Føroya:

# Sparingar elva til ruðuleika

**Sparingar hjá heilsu- og heimarøktarum føra til stóran ruðuleika á økinum. Limirnir hjá Heilsuhjálparafelagnum hava fingið boð um, at vegna sparingar skulu limirnir halda seg innanfyri setanarbrøkin og so lítið av meirtímum sum gjørligt skulu brúkast. Hetta meta heilsu- og heimarøktararnir verða ómøguligt**


*Ása Olsen, forkvinna í Heimarøktarafelagnum, sigur, at limirnir eru sera ónøgdir við sparingar, sum eru settar í verk. Hótt verður eisini við møguligum tiltøkum*

*Savnsmynd*

ÓNØGD
*Ingrid Bjarnastein*

Heilsu- og heimarøktararnir í Suðurstreymoy hava fingið boð um, at enn einaferð skulu sparingar gerast. Hesuferð á arbeiðsøkinum hjá heilsu- og heimarøktarunum. Boð eru givin frá økisleiðaranum um, at so fáir yvirtímar skulu takast sum møguligt, men sama arbeiðið skal gerast innan givna setanarbrøkin.

– Heilsu- og heimarøktararnir hava havt ein setanarbrøk, sum er millum 25 og 35 tímar. Um ein hevur arbeitt til dømis 25 tímar um vikuna, so hevur altíð borið til at fáa teir meirtímarnar, sum tørvur hevur verið á, tí ongin kann liva fyri 25 tímar um vikuna, greiðir Ása Olsen, forkvinna í Heilsuhjálparafelagnum frá.

– Nú hava vit fingið at vita, at tað er liðugt við meirtímunum, og um meirtímar verða tiknir, so skulu teir helst avspákast. Tað er tað nýggjasta útspælið frá økisleiðaranum, og er tað hetta limir okkara eru sera ónøgdir við.

**Kreppufund**

Mikudagin varð ein kreppufundur hildin fyri limirnar hjá Heilsuhjálparafelagnum í Suðurstreymoy.

– Limirnir kenna seg ótryggar og tað skapar til stóran ruðuleika og ónøgd, at eitt slíkt útspæl er komið frá økisleiðaranum. Nú hava vit fólk, sum ikki kunnu liva av sínum arbeiði, og tað kunnu vit ikki hava, sigur Ása Olsen.

– Okkara limir verða trýstir og útbrendir, um teir skulu arbeiða á henda hátt.

Eitt dømi er ein kvøldvakt, sum hevur eini 20 vitjanir eitt kvøld. Hetta skal kvøldvaktin klára innan átta tímar. Arbeiðið hjá eini kvøldvakt fevnir seg um alt frá persónligari røkt, at geva heilivág, at geva at eta og at leggja tey gomlu í song, so tað er ymiskt, hvussu langa tíð, hvør vitjan tekur.

– Tað ber ikki til at fara soleiðis við fólki. Ein kann eisini seta spurnartekin við tænastuna, sum nú skal verða veitt brúkarunum. Og umframt arbeiðið, so skulu vaktirnar eisini koyra runt í býnum, so tað er satt at siga ómøguligt.

**Tiltøk**

Ása Olsen skilir ikki, hví limirnir ikki kunnu koma í ein setanarbrøk, sum ásetur rætta tímatalið.

– Men higartil hevur tað ikki verið nakar trupulleiki, tá limirnir hava kunnað tikið teir meirtímarnar tørvur er á.

Heilsu- og heimarøktararnir vilja hava skil á hesum økinum, og so skjótt sum gjørligt eisini.

– Um okkurt ikki hendir skjótt, so fara vit at seta tiltøk í verk, sigur Ása Olsen, sum enn ikki dugir at siga, hvørji tiltøk tað verða.

– Tað kann vera so nógv, og vit fáa at síggja við tí til ta tíð.

Økisleiðarin fyri Suðurstreymoy vil onga viðmerking gera til støðuna, men vísir til stjóran í heimarøktini, Mary í Garði. Tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á henni áðrenn evstamark okkara.

# Tinghúsvegur 37 til AA og Al Anon

**Býráðið hevur keypt ognina Tinghúsvegur 37. Húsini verða leigað út til AA og Al Anon, sum eru felagsskapir fyri rúsdrekkamisnýtarar. Økið rundanum verður til eina park, sum skal verða opin hjá almenninginum at vitja**


*Tinghúsvegur 37 er nú ogn býráðsins og eru húsini útleigað til AA og Al Anon*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

KEYP
*Ingrid Bjarnastein*

Tinghúsvegur 37 er nú ogn býráðsins. Talan er um eini sethús, sum nú verða útleigað til AA og Al Anon, sum eru felagsskapir fyri rúsdrekkamisnýtarar og teirra avvarandi.

– Tey hava fingið húsini til leigu, og tað verður so teirra uppgáva at umvæla tey og halda tey við líka, sigur Jens Marius Poulsen, býráðsskrivari, so hvussu og nær húsini verða tikin í nýtslu veit hann ikki at siga.

– Dansifelagið hevur Hornahúsini, og Kvinnufelagið hevur til dømis Mettustovu. Tað stendur ikki í nakrari lóg, at býráðið skal hýsa felagsskapum sum hesum, men hetta er gjørt fyri at bøta um trivnaðin í høvuðsstaðnum.

Til ognina Tinghúsvegur 37 hoyrir ein stórur grønur garður, og harafturat eigur býráðið frammanundan tað grøna økið frá Sjónleikarahúsinum niðan til Tungugøtu. Sostatt strekkir økið hjá býráðnum seg frá Sjónleikarahúsinum og heilt niðan á Tinghúsvegin.

– Hetta økið kemur at verða ein park. Ein grønur blettur í býnum, har tað skal verða opið hjá almenninginum at vitja, sigur Jens Marius Poulsen.



*Rundanum Tinghúsveg 37 og oman til Sjónleikarahúsið er ein grønur blettur mitt í býnum. Býráðið eigur nú alt hetta økið, og skal tað verða opið hjá almenninginum at vitja*

*Mynd: www.kortal.fo*



Katrin Knudsen, studentaskúlanæmginur:

# Trý ár uttan fráveru

**Ove róð á sinni til Danmarkar, Guðrun Sólja vann Stjerne For En Aften, Heidi Andreassen hevur heimsmet í svimjing, og Torkil Nielsen skoraði í Landskrona. 20 ára gamla havnargentan, Katrin Knudsen, hevur eisini skrivað seg inn í søgubøkurnar. Hon er nevniliga fyrsti studentaskúlanæmingur, sum ikki hevur mist ein tann einasta skúlatíma í samfull trý ár, og hetta hevur eingin annar føroyingur megnað**


*- Eg angri ikki, at eg ikki tók mær av løttum og ikki fór í skúla av og á, men tað hava verið nakrar tvístøður, m.a. tá langabbi mín fór til gravar, sigur Katrin Knudsen m.a.*

UPPMØTING/-SKÚLAGONGD
*Heini í Skorini*

Katrin Knudsen úr Havn, sum fekk lokið studentsprógv í summar, hevur í trý ár verið ein vanligur næmingur í Føroya Studentaskúla í Hoydølum. Men eitt fyribrigdi hevur gjørt Katrin til ein øðrvísi næming enn allar hinar, nevniliga fráveran.

Katrin Knudsen hevur sum fyrsti næmingur nakrantíð ikki mist ein tann einasta skúlatíma í samfull trý ár, og tað ger 20 ára gomlu havnargentuna til nakað serligt.

Umframt at hava møtt upp til 100% av skúlatímunum hesi trý árini, hevur hon í fólkaskúlanum líka frá fyrsta flokki ongantíð skulkað.

- Teir einastu tímarnir, eg misti í fólkaskúlanum, var, tá vit skuldu til tannlækna, men tá varð ein ikki skrivaður upp sum fráverandi, sigur Katrin Knudsen, tá vit hittu hana í Dalinum Fagra í Hoydølum frammanfyri skúlanum, hon í trý ár hvønn skúladag hevur møtt upp á. So í veruleikanum tosa vit um 13 ár og ikki bert trý ár

**Birgir Kruse legði lunnar undir**

Spurd, hví hon hevur valt hesa heldur óvanligu skúlaleið, er Katrin skjót at svara, at ein hending fyri 13 árum síðani hevði stórt árin á hana.

- Eg var ov sein í skúla í fyrsta tíma mínum í fyrsta flokki, og Birgir Kruse var lærari. Hendan dagin hugdi hann í eygu míni og segði, at í skúlanum møtir ein upp, eisini til tíðina. Síðani tá havi eg ikki megnað at hyggja ein lærara í eyguni, um eg havi verið fráverandi í tímum hansara, sigur Katrin Knudsen við einum smíli.

Hon heldur, at tá ein lærari fyrireikar hvønn einasta tíma og sjálvur møtir upp, heldur hon tað vera synd í læraranum, um næmingarnir ikki møta upp. Katrin vísir víðari á, at júst sjónarhorn lærarans hevur verið høvuðsorsøk hennara at møta upp til allar tímarnar gjøgnum øll árini.

- Tað hevur ikki verið av fakligum orsøkum, at eg ikki havi viljað mist nakran tíma, men fyri lærarans skuld, sum hevur fyrireikað alt og tískil eigur at fáa virðing. Katrin leggur flennandi afturat, at hon sanniliga ikki altíð hevur verið til staðar sálarliga, hóast hon likamliga hevur sitið á plássi sínum í stovuni.

**Flokkurin argaði**

Ein kann ikki bara sær at spyrja, hvussu ólukkan hon hevur megnað at fullføra hetta, og hvat hon hevur gjørt við allar tær forðingar, sum eru á leiðini fram ímóti lovaða landinum, nevniliga 0% í fráveru eftir trý ár.

- Flokkur mín hevur verið ein forðing, serliga í byrjanini. Tey skiltu ikki, at eg ikki vildi missa nakran tíma, men eg skilti heldur ikki, at tey ikki kundu skilja meg og mína søk, sigur Katrin. Hon leggur mær eina við at fáa við, at talan altso var um ein sera góðan flokk, hóast tey av og á argaðu hana við ymiskum.

- Einaferð, tá eg gekk á høkjum, og vit skuldu skifta stovu, vórðu høkjurnar tiknar frá mær, so eg ikki kundi flyta meg, men tíbetur megnaði eg at fáa tær aftur og skifta stovu, áðrenn næsti tímin byrjaði. Annars hava tey ofta tikið skúlating míni, so eg skal vera ov sein til næsta tíman og harvið skrivað upp sum fráverandi, men mítt illsinni gjørdi, at tey góvust við hesum, sigur ein flennandi Katrin.

Katrin sigur víðari frá, at ein dagin var lærari sjúkur, og flokkurin kundi tískil fara heim.

- Eg var eisini farin heim, men knappliga ringdu tveir floksfelagir og søgdu, at lærarin allíkavæl var møttur upp. Eg skundaði mær oman so skjótt eg kundi, og tá sótu tey í vindeyganum og flentu, sigur Katrin.

Sostatt hevur hon á ein hátt verið undir einum bólkatrýsti, og Katrin heldur, at tað at vera øðrvísi hevur verið høvuðsforðing hennara. Nýklakta studentapisan undirstrikar tó, at flokkurin mest gjørdi hetta í spølni uttan nakrar óndsinnaðar ætlanir.

**Kapping móti endanum**

Sum tíðin leið, broyttist hugburðurin uttanífrá, og Katrin sigur frá, at flokkurin gjørdist stoltari av henni.

- Móti endanum av skúlaskeiðinum søgdu fleiri við meg, at tað var flott ikki at hava mist nakran tíma, og flokkurin gjørdist eisini stoltur av tí. Jú nærri vit komu endanum, jú fleiri søgdu við meg, at nú skuldi eg halda fast um avrikið, og tað, sum byrjaði sum nakað náttúrligt, gjørdist móti endanum til eina kapping og avbjóðing móti mær sjálvari, hugleiðir Katrin.

Hon leggur afturat, at hon frá byrjan ongantíð setti sær nakað mál viðvíkjandi fráveru, tað var ein heilt náttúrligur partur av skúlagongdini at møta upp til tímarnar.

- Men móti endanum skuldi eg altso halda fast, sigur hon brosandi.

> ” Frá byrjan setti eg mær ongantíð sum mál ikki at missa nakran tíma, tí tað fall mær náttúrligt at møta upp, men móti endanum royndi eg so at fullføra hetta, sigur 20 ára gamla havnargentan, Katrin Knudsen “

**Endamálið at røkja skyldu sína**

Fráveruskipan skúlans loyvir í mesta lagi 10% í fráveru, og spurd, hvat endamálið er at enda við 0% gjøgnum trý ár, tá ein hevur loyvi at fráverandi 10% hvørt ár, hevur havnargentan eina einfalda orsøk.

- Endamál mítt hevur stutt sagt verið at røkja skyldu mína. Eg havi kent tað sum eina plikt at møta upp, og eg havi altíð havt sera torført at skuffa fólk, í hesum føri lærararnar, sigur Katrin einfalt.

**Einaferð ov sein**

Tað er bert einaferð hent, at Katrin er komin ov seint, men tað var ikki hennara skuld.

- Í sambandi við eina verkætlan vóru vit í SMS og skuldu framkalla nakrar myndir saman við lærara okkara. Hann tók longri tíð enn ætlað, og tað gjørdi so, at eg ikki náddi niðan í Hoydalar til næsta tíman, sum eg var skrivað upp sum fráverandi fyri.

Katrin leggur tó afturat, at hon eftir hetta fekk viðkomandi lærara at skrivað undir uppá, at hon varð ov sein orsakað av eini verkætlan, og tískil fekk hon hildið fráveruna á 0 tímum.

**Skúlin framum skulkidag og jarðarferð**

Jarnvilji Katrins er veruliga royndur ígjøgnum hesi trý árini, tá serlig høvi hava verið á skránni, sum hava sett Katrin í eina tvístøðu.

- Tá langabbi mín doyði, sum eg stóð sera nær, var eg í eini torførari tvístøðu. Eg valdi at fara í skúla, so eg misti fyrsta partin av jarðarferðini, og orsøkin til avgerð mína var, at langabbi hevði skilt meg og søk mína, sigur Katrin Knudsen.

Viðvíkjandi sjúku nevnir Katrin, at tað hevur borið so á, at hon bert hevur verið sjúk í vikuskiftum og frítíðum, og at talan bert hevur verið um smávegis krím í skúlatíðini.

Av øðrum líknandi tilburðum nevnir hon tiltikna skulkidagin, tá allir 3. g´arar fara við bussum inn í Eysturoynna og halda stóra veitslu frá morgni til myrkurs, men tá valdi hon eisini at fara í skúla.

- Skulkidagin hevði eg gjarna vilja havt upplivað, men tað var ongantíð ein tvístøða, tí eg visti, hvat eg vildi. Hon leggur afturat, at einsamøll varð hon undirvíst av Svannu Hanusardóttir í føroyskum, meðan hinir lærararnir ikki tímdu at undirvísa bert einum næmingi.

**Fantastiskt**

Ja, hvat skal man siga... Vit gera okkum galdandi á ymsum økjum og velja ymsar greinir at leggja dent á. 20 ára gamla Katrin Knudsen valdi sostatt eina heldur øðrvísi avbjóðing og kapping at taka upp, og líkamikið um vit hava hug at rósa ella finnast at, er talan í øllum førum um eitt satt bragd, sum eingin føroyingur áður hevur megnað.

- Eg angri so ikki, at eg ikki onkuntíð tók mær av løttum og lat onkran tíma detta niður ímillum, eru afturlítandi metingar Katrin Knudsens at enda.

Fantastiskt!